# Nýggjar lættlisnar bøkur

Sjey nýggjar lættlisnar bøkur eru komnar í Krabbarøðini. Tvær eru til annað torleikastig, *So býttur eri eg ikki* og *Heilt til grannabygdina*. Fimm eru til fjóðra torleikastig: *Húsini í súreplagarðinum, Leið meg Samira, Turbo* og *Spøkilsishúsið, Snýs, njós, histi og hosti* og *Blinka, blunka, venda og snara*. Hesar báðar seinastu eru fyrstu fakbøkurnar í røðini. Tað eru Bókadeild Føroya Lærarafelags og Føroya Skúlabókagrunnur, sum í felag geva bøkurnar út






*Tveir av vertunum á Rás2 – Eyðfinn Drewsen og Heri Simonsen*

*Alvin Ellebye Andersen hevur verið tøkningur á Rás2*

*Jens Marni Hansen er ein av mongu tónleikarunum, sum hava spælt live á Rás2*

*Pink-damurnar hava sett lit á Rás2 fyrsta árið*

*Niels Uni Dam er gestur í morgunsending*

*Annika Mittún Jacobsen, nýggi kringvarpsstjóri, var gestur á Rás2, tá hon var sett í nýggja starvið*

*Høgni Hoydal og Jóannes Eidesgaard gevur hvørjum øðrum jólagávur fyri opnari mikrofon*

*Jan Muller tosar við Karl Martin Samuelsen í Pegasus*

# Rúm fyri Rás2

**Rás2 hevur rundað sín fyrsta føðingardag. Stjórin er væl nøgdur við gongdina og heldur, at framtíðin sær spennandi út**

RÁS2
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Í dag hevur Rás2 hildið sín fyrsta føðingardag. Eitt gott ár er liðið, síðani Miðlavarpið keypti Rás2 frá undanfarnu eigarunum, og í eitt ár hevur nýggja Rás2 verið í luftini.

- Vit eru sera væl nøgd við gongdina higartil. Vit merkja ein stóran áhuga fyri Rás2, undirtøkan er góð, og tað gevur okkum hug at halda fram, sigur Jonhard Hammer, stjóri á Rás2.

Rás2 hevur frá byrjan lagt seg eftir at verða frískt og livandi, og hóast summi fólk halda, at ov nógv fjant og fjas er á rásini, so órógvar tað ikki stjóran.

- Vit skulu verða alternativt radio. Vit skulu ikki verða public service støð nummar 2, og tí hava vit eisini ein lættan tóna. Soleiðis verður tað eisini frameftir, sigur Jonhard Hammer.

*Hvat ynskir tú tær í føðingardagsgávu?*

- At Kringvarpið gevur rúmd fyri Rás2 og ikki roynir at leggja fót fyri okkum við almennum pengum. Tað eigur at verða rúm fyri Rás2, og tað eigur Kringvarpið eisini at virða.

Í dag hevur Rás2 hildið føðingardagin. Opið hús var seinnapartin í Miðlahúsinum, og Rás2 hevði eisini serliga føðingardagssending.